# siðvenju og nýbrot



*Nýggi presturin í Klaksvík, Magnus Brahè Jørgensen, helt fyrstsu ólavsøkuprædikuna í yvirtiknu føroysku kirkjuni. Gudstænastan fylgdi tó siðbundna leistinum, har millum annað Kingokórið úr Tjørnuvík sang*



*Onkur av ítróttarfólkunum hevði fingið sær nýtt hár til dagin.*



*Føroyski búnin er framvegis líka væl umtóktur. Bæði børn, foreldur og ommur og abbar vóru ílætin stásiliga tjóðarbúnan.*



*Stórsta og mest siðbundna hátíðarløtan á Ólavsøku er uttan iva skrúðgongan millum kirkju og løgting. Henda fyrsta Ólavsøkan við yvirtiknari føroyskari kirkju var eisini tann seinasta við Hans Paula Joensen sum bispi.*



*Stúgvandi fult av fólki var komið saman at hyggja eftir skrúðgonguni, at lurta eftir Ólavsøkukórinum og at hugna sær og práta við vinir og kenningar.*



*Danski kirkjumálaráðharrin, Bertel Harder, var saman við fylgi komin til Føroya at undirskriva samstarvsavtalu við føroyska landsstýrið. Her prátar hann við bisp uttan fyri løgtingi í góðveðrinum sunnumorgunin.*



*Føroyski mannfólkabúnin var væl umboðaður í løgtinginum á Ólavsøku. Hetta er síðsta Ólavsøka hjá hesum løgtinginum og hesari samgonguni.*



*Ársins ólavsøkuframsýning, Slóarblóð, fylgdi ikki siðvenjuni. Nýggir fyrireikarar høvdu avmarkað luttøkuna til listafólk millum 18 og 30 ár, og myndirnar á blóðreyðu veggunum ímyndaðu ikki siðbundna føroyska landslagi.*